# Skal gera oynna kenda




*Tey trý starvsfólkini á Kunningarstovuni í Vágum undir nýggja búmerkinum. Terji Nielsen, Anna Sofia Nordendal og Astrid Berglíð*

**Uppgávan hjá eini kunningarstovu er at gera økið, hon umboðar, kent. Við teimum betraðu umstøðunum, Kunningarstovan í Vágum nú hevur fingið, væntar leiðarin nýggjar tíðir**

KUNNING
*Orð/myndir Edvard Joensen*
*edvards@sosialurin.fo*

**Miðvági:**
Kunningarstovan í Vágum Ssal gerast meira sjónlig og menna ferðavinnuna í oynni munandi, sigur kunningarleiðarin, Terji Nielsen. Betraðu hølisviðurskiftini fara at leggja lunnar undir hesa mennigina, metir hann.

Frá at húsast í einum rúmi á kommunuskrivstovuni í Miðvági er Kunningarstovan nú flutt í væl størri høli hjá Godtfred Joensen yvir av Sparikassanum í Miðvági. Stórir sýnisgluggar og skelti á húsinum gera beinanveg Kunningarstovuna sjónligari, og tað skuldi so verið við til at leitt fleiri fólk inn á gólvið, heldur leiðarin.

Tað hevur verið heldur smátt við tí, sigur hann, og metir, at enn ikki øll vágafólk vistu, hvar Kunningarstovan helt til.

Umframt høvuðsskrivstovuna í Miðvági rekur Kunningarstovan hjá Felagnum Vágum eisini kunningardiskin á flogvøllinum. Tey eru trý fólk, sum starvast hjá Felagnum Vágum í dag. Eitt er tó hálva tíð.

Í samband við at Kunningarstovan mánadagin flutti í nýggju hølini í Miðvági, var samkoma, har almenningurin og innboðin vóru til staðar.

Tiltakið byrjaði við, at bussur úr Vágum fór til Havnar eftir fólki frá ferðavinnuni, sum boðin vóru vestur í Vágar í samband við tiltakið.

Farið varð fyrst til Sandavágs, har fróðarmaðurin Sigurd Petersen, fyrrverandi skúlastjóri, fór gongutúr oman við Stórá, eftir Steigini og oman í kirkjuna.

Sigurd Petersen segði á túrinum frá um løgmanstíðina, umhvørvið við Løgmansgarðin og frá kirkjum í Sandavági og serliga hesi, ið nú er.

Á Kunningarstovuni í Miðvági var móttøka í samband við flytingina. Starvsfelagarnir frá Kunningarstovunum norðanfjørðs vóru komnir at heilsa upp á manningina í Vágum og bera fram góðynski. Umframt vóru eisini fólk frá Ferðaráðnum og ymsum ferðaskrivstovum, sum vóru komin inn á gólvið. Vágafólk vóru eisini millum gestirnar. Kommunalpolitikarar, vinnufólk og handilsfólk.

Ein teirra, sum hevði orðið á samkomuni Miðvági, var stjórin á Ferðaráði Føroya, Heri Niclasen.

Hann ásannaði, at Kunningarsovan í Vágum hevur verið í so anonym, og metti hann hetta vera orsakað av teirri ógvuliga sparnu pengajáttan, arbeitt hevur verið við hesi árini, Kunningarstovan hevur verið til.

Men sum skilst eru vinnufól og komunur í Vágum nú vorðin greið yvir, at skal oyggin marknaðarførast, eigur tað at gerast við eini Kunningarstovu, og tað krevur pengar.

Hann fegnasðist eisini um, at Kunningarstovan hevur yvirtikið kunningardiskin á flogvøllinum og vónaði og væntaði gott samstarv millum Feðraráðið og Kunningarstovuna í Vágum í framtíðini.

Tað er Felagið Vágar, sum rekur Kunningarstovuna. Felagið Vágar er samtak av vinnufeløgum og ferðavinnuni í Vágum. Eisini eru kommunurnar við í samtakinum.

Fleiri teirra, sum starvast á øðrum kunningarstovum kring landið, høvdu eisini orðið og ynsku starvsfeløgunum i Vágum góða eydnu og lovaðu gott samstarv. Havt varð millum annað á orði, at tey fegnaðust um at kunna ásanna, at Kunningarstovurnar nú vóru vorðnar ein verdugur samstarvsfelagi hjá Ferðaráðnum.

At gera Kunningarstovuna í Miðvági rættiliga sjónska skal nýggja búmerkið, sum avdúkað varð hendan dagin, vera við til.

Skrivað varð út kapping um búmerki, og ikki færri enn 81 uppskot komu inn. Fyrstu viðrisløn fekk Jógvan Høgnesen í Leirvík fyri búmerkið, sum nú hongur yvir inngongdini til Kunningarstovuna í Miðvági.



*Ingigerð á Trøðni, leiðari á Kunnignarstovuni í Havn ynskir kunningarleiðaranum í Vágum góða eydnu*



*Hesar báðar tosa ivaleyst um gongutúrar í Føroyum*



## NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.



### Svend Thulesen 75 ár

Leygardagin 27. september fylti Svend Thulesen, fyrrverandi stjóri í P/F J.F. Kjølbro, búsitandi í Keypmannahavn, 75 ár.

Svend Thulesen er føddur í Keypmannahavn, sonur Marthu og Erik Thulesen. Foreldrini vóru donsk, og pápin var eina tíð sóknarprestur í Vági.

Svend fekk realprógv í Vági í 1943 og studentsprógv í Keypmannahavn í 1947. Í 1954 fekk hann prógv sum siviløkonom á handilsháskúlanum í Keypmannahavn.

Hann arbeiddi sum roknskaparmaður hjá Colgate-Palmolive í Keypmannahavn frá 1955-60. Hann var stjóri og sat í stýrinum fyri Nordafar í Føroyingahavnini frá 1960-65 og stjóri í P/F J.F.Kjølbro í Klaksvík í 30 ár, frá 1966-96.

Svend Thulesen hevði nógv álitisstørv í føroyska samfelagnum, t.d. sat hann í nevndini fyri Føroya Fiskasølu frá 1974-96, har hann í nógv ár var nevndarformaður. Hann sat í nevndini fyri Føroya Arbeiðsgevarafelag frá 1975-82. Hann var formaður í stýrinum fyri Ráfiskanevndina frá 1967-77, í Føroya Reiðarafelag frá 1969-80 og Føroya Ídnaðargrunni frá 1971-75. Hann var nevndarlimur í Føroya Banka frá 1970-91 og í Realkredittinum frá 1970-97 og í Tryggingarsambandinum Føroyar frá 1979-83. Eisini var hann býráðslimur í Klaksvík frá 1981-84 og sum eykamaður frá 1985-88.

Svend giftist í 1951 við Astu, f. Gaard, fødd í 1930, dóttir Ellu f, Mohr, og Martin Gaard. Asta og Svend búðu í Klaksvík øll árini, meðan Svend var stjóri hjá J.F. Kjølbro. Tey fingu eina dóttir, Randi, sum er gift við Hans Paula Johannesen úr Klaksvík, tey búgva í Keypmannahavn og eiga synirnar Bjarka og Hjalta.

Síðst í 90-unum fluttu Asta og Svend til Danmarkar at búgva og búsettust í Keypmannahavn. Asta doyði í 1999.

### Erland Ludvig 50



29. september fylti Erland Ludvig lærari í Havn 50 ár. Erland er vestmenningur, sonur Tullu, f. Christoffersen, úr Vestmanna, og Jarmund Ludvig, ættaður úr Vági. Erland tók prógv sum frítíðarpedagogur í 1978 og læraraprógv á Føroya Læraraskúla í 1982. Hann var eitt tíðarskeið lærari á Syðradali og á Argjum frá 1982-84. Síðan 1984 hevur hann verið lærari á Venjingarskúlanum.

Hann er giftur við Beintu Nattestad úr Havn, dóttir Ninnu, f. Jensen, úr Porkeri, og Asbjørn Nattestad, úr Hvalba, sum var fangavørður í Havn.

Beinta og Erland eiga tvær døtur: Elin, 28 ár, og Malan, 22 ár, sum báðar eru búsitandi í Danmark.

### Regin Abrahamsen 60



Í dag, 1. oktober, fyllir Regin Abrahamsen í Nakskov 60 ár. Hann er føddur í Oyndarfirði, sonur Janu Eldevig úr Elduvík og Hans J. Abrahamsen úr Oyndarfirði.

Regin tók læraraprógv á Haslev Seminarium í 1969. Hann var lærari í Nyker á Bornholm til 1971, síðani í Stormarnskolen í Nakskov til 1981, í Fuglafirði til 1983 og síðani tað aftur í Nakskov.

Hann hevur verið á fleiri ársskeiðum og øðrum skeiðum, serliga í alisfrøði, elektronikki, EDV, fotolæru og sjónbandaupptøku. Um kvøldarnar hevur hann undirvíst á ungdómsskúlanum í Nakskov. Hann ger nógv við at telva og hevur verið formaður í talvfelagnum í Nakskov.

Czeslaw Slania:

# Graverað 100 føroysk frímerki

Gravørurin Czeslaw Slania er kendur um allan heim fyri hansara listarligu verk og tað ótrúliga ágrýtni. Hann hevur graverað meiri enn 1000 frímerki - og er hetta eitt heimsmet, sum helst ongin kemur nær.



Czeslaw Slania er føddur 22. oktober, 1921 í lítla polska býnum Czelad. Longu sum smádrongur vísti hann evnir til at arbeiða við smáum sniðum, tá hann nýtti pengaseðlar sum fyrimynd fyri tekningar hansara. Hann teknaði eisini pinkumyndir av floksfelagum og av hestum. Hann var útlærdur á Listaháskúlanum í Krakow, sum er ein av mest viðurkendu skúlunum fyri grafiska list. Meðan hann las, fekk hann arbeiði hjá polsku ríkisprentsmiðjuni, har hann arbeiddi í 6 ár.

Í 1956 flutti 35 ára gamli Slania til Svøríki, har hann fór at arbeiða fyri svenska postverkið. Hann hevur graverað frímerki fyri svenska postverkið í meira enn 40 ár. Síðan hann byrjaði at gravera fyri svenska postverkið, eru fleiri onnur lond vorðin fastir kundar hjá honum. Hann er síðan heiðraður sum kongligur gravørur í Svøríki, Danmark og Monaco, og hevur vunnið mangar virðislønir fyri tær snøggu og neyvu gravururnar. Umframt frímerki, hevur hann eisini graverað pengaseðlar, og fleiri privat verk, sum hann hevur gjørt "til stuttleika". Her kann nevnast ein røð av kendum kvinnuligum filmleikarum, og ein røð við heimsmeistarum í boksing frá 1889 til 1964.

Slania er ein fjølbroyttur listamaður. Tað sæst á teimum mongu evnunum hann arbeiðir við, sum fevna um alt frá kongaligum andlitsmyndum, og plantu- og djóraríkinum til filmstjørnur. Hann hevur enntá tíð og pláss til at seta sítt persónliga eyðkenni á tey evarska lítlu listaverkini m.a. eina keipumynd av honum sjálvum ella nøvn á vinum.

"Tað er ein fragt at myndevnini eru so fjøltáttað", sigur Slania. "Hetta ger tað meiri áhugavert at arbeiða sum gravørur. Mær dámar best at arbeiða, tá fleiri ymiskir smálutir eru í einum myndevni, so sum hestar, skýggj, ber húð ella kanska ein brosja….. Hetta ger arbeiði deiliga fløkt, akkurát sum á mínum frímerki nummar 1000."

Czeslaw Slania graveraði tey fyrstu frímerkini, sum Postverk Føroya gav út í 1976, og hevur síðan hann í alt graverað hundrað føroysk frímerki.

*Kelda: Postverk Føroya, Frímerkjadeildin*



*Veðrahøvd, sum Czeslaw Slania hevur graverað fyri Postverk Føroya*

### Dagurin

**Oktober**
Í gamla rómverska kalendaranum byrjaði árið við marsmánaði, og oktober var so áttandi mánaðurin, octo merkir júst átta. Hjá okkum er hann tann tíggjundi.

**1. oktober. Remigius,** deyður í 533. Galliskur aðalsmaður, sum longu 22 ára gamal varð valdur til biskup í Reims. Kristnaði Chlodovech kong, sum var langabbi Karlamagnus. Remigius doyði 96 ára gamal.